Vís at tú leggur í.
Gev eini mammu vón.
Lætt um stúranina hjá einum pápa.

# Gleð eitt barn á jólum

Tað eru ikki øll, sum gleða seg til jóla. Í Føroyum eru børn, sum liva í familjum við truplum fíggjarligum korum, og hetta setir síni spor í gerandisdegnum. Á jólum merkja tey, meira enn nakrantíð, tær avmarkingar, ið fíggjarlig trongstøða hevur við sær.

Átakið **Í menniskjum góður tokki** vil rætta hesum familjum eina hjálpandi hond. Men tað kunnu vit bert gera, um tú vilt vera við til at skapa gleði og vísa at tú leggur í.

**STUÐLA VIÐ SMS**
Send "takk" til 1919 og stuðla við kr. 100,-
(av hesum fara kr. 15,- til sms-skipanina)

**STUÐLA Á KVINNA.FO**
Á www.kvinna.fo kanst tú stuðla umvegis gjaldskort.
(Ókeypis)

Tann stuðul, sum kemur inn, verður óskerdur býttur til tær familjur, sum søkja jólahjálp. **Les meira á www.takk.fo**



www.takk.fo

Í MENNISKJUM GÓÐUR TOKKI

# HÝRUVOGNSLOYVI

**Í Tórshavnar kommunu er eitt hýruvognsloyvi leyst at søkja. Loyvið er knýtt at bilstøðini Auto.**

Umsóknin skal skrivast á umsóknarblað, sum fæst í Snarskivuni ella á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu www.torshavn.fo

**SAMAN VIÐ UMSÓKNARBLAÐNUM SKULU LATAST**

- avrit av koyrikorti við átekning til hýruvognskoyring og
- revsiváttan

**UMSÓKN**
Umsóknir skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 29. november 2010.

Sambært kunngerð nr. 33 frá 30. mars 1983 um eina standard hýruvognsreglugerð, sum broytt við kunngerð nr. 139 frá 7. desember 1990, umsitur hýruvognsnevndin hýruvognsloyvi í kommununi. 67 hýruvognsloyvi eru í Tórshavnar kommunu.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Tangabilførarar til Magn

## Vit sóknast eftir tveimum tangabilførarum til Magn

**Um Magn**
Magn tryggjar orku til Føroyar og føroyingar. Vit eru 130 starvsfólk, svarandi til 80 ársverk. Høvuðsskrivstova okkara er í Havn og deildarskrivstovur eru í Klaksvík og á Tvøroyri. 10 service støðir bera Magn navnið, av hesum eigur Magn tær 4. Vit hava goymslur í Klaksvík og í Havn, og mált uppá sølu eru vit ein av Føroya størstu fyritøkum.

**Um størvini**
Eftir ávikavíst 43 og 36 ára drúgva og framúr góða tænastu, hava tangabilførarar okkara í Vágum og Norðstreymi valt at heilsa einum væluppibornum otium vælkomnum. Í hesum sambandi sóknast vit eftir tveimum røskum og fyrikomandi persónum at røkja hesar uppgávur.

**Økið 1:** er í Vágum, og verður hetta starvið sett pr. 1. desember 2010. Tó bíða vit fegin eftir tí rætta persóninum.
**Økið 2:** er í Norðstreymi, og verður hetta starvið sett pr. 1. februar 2011.

**Uppgávur í stuttum:**
- Útkoyring av olju til heim og virkir
- Útkoyring av diesel og bensini til Magnstøðir
- Útkoyring av olju til bátaannlegg
- Aðrar uppgávur í hesum sambandi

**Vit bjóða:**
Eitt gott, avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í eini fyritøku í menning. Her er vítt til veggja, og um tú vilt og dugir, so sleppur tú eisini. Tað er avgerðandi, at tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og at tú loysir tínar uppgávur væl. Av hesi orsøk fært tú góðan stuðul og alla neyðuga upplæring og útbúgving.

**Vit vænta:**
- At tú hevur stóra koyrikort „B" við viðkomandi royndum.
- At tú helst hevur kranaloyvi – tó ongin treyt.
- At tú ert tænastusinnað/ur og góð evni at samskifta og samstarva
- At tú hevur áræði, ert røkin og dugur væl at arbeiða sjálvstøðug.
- At tú eisini hevur møguleika og vilja at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð
- At tú ert væl fyri kropsliga
- At tú helst býrt í teimum økjum uppgávurnar liggja.

**Okkara virði eru:**
- Kundin í fokus
- Vitan og førleiki leingi livið
- Skjótt er gott
- Gleði gevur megi.

Umsóknir skulu latast inn innan 23. november 2010.

Antin við at senda bræv til:
**Magn**
**Vestara Bryggja 10**
**FO-110 Tórshavn**
**Att.: Andrias Jacobsen**

Ella við teldupost til andrias@magn.fo

Sosialurin 341800

magn

*Hevur tú spurningar, vinarliga vend tær til Andrias Jacobsen, leiðari fyri útkoyringina á tel. 347470, 237470 ella á andrias@magn.fo*

TÍN ORKA